# Ung í Føroyum – stevnan fyri skapandi ung

Tann 28. og 29. februar og 1. mars verður **UíF 2.0** í Norðurlandahúsinum

Tekningarfreistin er **26. januar**

**Hvat er UíF 2.O?**

**UíF 2.O**, aka Ung í Føroyum 2020, er stevna fyri tykkum skapandi ungu millum 13 og 19 ár sum er annaðhvørt ár í størsta mentanarhúsinum í landinum. **UíF 2.0 er verkstovur, framførslur og góður felagsskapur**. Hesaferð kunnu tey teknað seg sum eru fødd frá 2001 til 2006.

Her kunnu tit **vísa egin avrik** fyri javnaldrum, at vera við á **listaverkstovum** undir leiðslu av dugnaligum listafólkum og **skapa nýggja list** at sýna fram fyri almenninginum og soleiðis vísa øllum, hvat **tit halda** at ungdómsmentanin 2020 er.

**Hvør kemur á stevnuna?**

Ung í Føroyum er fyri øll ung, sum eru listarliga áhugaði, bæði

- tykkum, sum hava **nógvar royndir**
- tykkum, sum **akkurát eru byrjaði**
- tykkum, sum bara eru forvitin at fara í **gongd við nakað nýtt**.

**60 pláss** eru á stevnuni, 10 luttakarar eru á hvørjari verkstovu.

**Verkstovur:**

Verkstovuleiðararnir eru yrkislistafólk, sum hava **drúgvar royndir** innan sína listagrein og stóran **áhuga í at geva** tykkum vegleiðing og **innlit** í at arbeiða listarliga, at lyfta tykkum víðari á leiðini, tit hava valt og eisini vísa tykkum á alt tað, tit enn ikki hava upplivað. Hóast tit øll ikki verða listafólk í framtíðini, skapar hetta **tilvit og vitan** um ein týðandi part av okkara mentan og samfelag.

Verkstovurnar á **UíF 2.0** eru:

Tónleikur við **Heðin Ziska Davidsen**
Skriving við **Marjun Syderbø Kjelnæs**
Sjónleikur við **Búa Dam**
Dansur við **Katyu Nielsen**
Myndlist við **Jón Sonna Jensen**
Foto við **Lydiu Hansen**

**Open stage – Fríggjakvøld og leygarkvøld:**

Bæði tey fyrstu kvøldini á stevnuni eru **hugnakvøld**, har tit kunnu framføra fyri hvørjum øðrum á **opnum palli**. Ongi mørk eru fyri, hvør listarliga framførslan er, tað kann vera sjónleikur, dansur, tónleikur, myndlistaverk, filmur, standmynd, mótasýning.... **bara hugflogið setur markið**.

**Livandi Norðurlandahús – sunnukvøld:**

Stevnan endar við einum almennum tiltaki, har **øll kunnu koma** inn at síggja verkini, ið eru skapt á stevnuni. Har fara at vera smærri og størri hendingar runt um í øllum Norðurlandahúsinum.

**Tekna teg!**

Droymir tú um nýggjar **upplivingar**, um at **skapa** nakað ongin hevur gjørt undan tær, um at fáa **nýggj vinfólk** og **netverk** so tekna teg á www.ungiforoyum.info innan **26. januar**!

**Spurningar:**

Vilt tú vita meira, kanst tú **vitja** heimasíðuna www.ungiforoyum.info, **skriva** til ungiforoyum@gmail.com ella **ringja** á 216596.